## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind av suðri. Fyrrapartin ælingur, partvís heglingur, annars turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin skrið ella stormur av landsynningi og regn, men seinnapartin hvassur vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og lítið ella einki anfall, men mjørki í støðum. Hitin millum 6 og 10 stig.

Miss Galaxy:

# Tað kvinnuliga móti tí mansliga

**Annað árið á rað verður skipað fyri Miss Galaxy kapping á Hálsi. Kappingin verður 7. desember. Kappingin er ein blanding av EM og FM**

KAPPING
*Ingrid Bjarnastein*



*Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen*

Hetta er triðja kappingin av sínum slag í Føroyum. Fyrstu ferð æt hon tó Føroya Fimasta Kvinna.

Miss Galaxy kappingin er býtt upp í tríggjar partar. Fyrst skal poserast í kjóla, síðani í bikini og síðsti partur er ein forðingsbreyt. Har ræður um at koma ígjøgnum breytina uppá so stutta tíð sum gjørligt. Her er tað styrki, fimi og kvikleiki, sum spælir inn.

27 ára gamla Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen hevur verið við í báðum teimum undanfarnu kappingunum, og vann hon eisini báðu ferðirnar. Í fjør var virðislønin at sleppa við til EM í Barcelona og VM í Kina, men báðar kappingarnar vórðu avlýstar, tí stuðlarnir tóku seg aftur. Ætlanin var síðani at gera eina kapping í Íslandi, men tann kappingin varð eisini avlýst.

Kappingin í Føroyum verður tí ein blanding av EM og FM, og tí verða ikki bert føroyskir luttakarar við. Tríggir útlendskir og tríggir føroyskir dómarar vera. Forðingsbreytin telur 50% av kappingini, bikiniparturin 40% og kjólin 10%, so tað ræður ikki bert um at vera kvikur og fimur – kroppurin má eisini verða í lagi.

– Eg vóni at vinna FM, sigur Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen.

– Tað er ikki so stórt trýst á mær, men eg hopi eg verða millum tríggjar tær bestu til EM. Tað eru bert tríggjar vikur síðani eg fekk at vita, at kappingin skuldi vera, so eg havi ikki havt so nógva tíð at fyrireika meg í.

Sambært Sóleyð er hetta ein kapping við tí kvinnuliga ímóti tí mansliga. Ein skal ikki líkjast eini model, men tó skal man verða rættiliga væl »trimmaður«.




**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷7 |
| Qaqortoq | ÷8 |
| Ammassalik | ÷5 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 7 |
| Tromsø | 1 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷7 |
| Bukarest | ÷1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 9 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | ÷1 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 995 hPa. yvir Írlandi fer eystureftir.Eitt annað lágtrýst, 1014 hPa. á 42N-31V fer í landnyrðing og dýpist.




Eitt lágtrýst, undir 1000 hPa. vestan fyri Írland kemur móti Føroyum og dýpist. Tað gevur nógvan vind fríggjadagin.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/12 kl. 06⁰⁰– 05/12 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 9,0 mm – mált frá 04/12 kl. 06⁰⁰– 05/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 13,5 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

30. nov.: Fullmáni
6. des.: Mánin næstur jørðini
7. des.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. des | 10.50 | 23.30 | 09.50 | 22.30 | 10.05 | 22.45 | 00.25 | 12.50 | 01.25 | 13.50 | 09.05 | 21.45 | 08.05 | 20.45 | 11.05 | 23.45 | — | 12.05 | 10.35 | 23.15 | 11.50 | — |
| 7. des | — | 12.10 | 11.10 | 23.48 | 11.25 | — | 01.30 | 14.10 | 02.30 | 15.10 | 10.25 | 23.03 | 09.25 | 22.03 | — | 12.25 | 00.45 | 13.25 | 11.55 | — | 00.30 | 13.10 |
| 8. des | 00.48 | 13.26 | — | 12.26 | 00.03 | 12.41 | 02.48 | 15.26 | 03.48 | 16.26 | 11.41 | — | 10.41 | 23.04 | 01.03 | 13.41 | 02.03 | 14.41 | 00.33 | 13.11 | 01.48 | 14.26 |
| 9. des | 01.49 | 14.13 | 00.49 | 13.13 | 01.04 | 13.28 | 03.49 | 16.13 | 04.49 | 17.13 | 00.04 | 12.28 | 11.28 | 23.51 | 02.04 | 14.28 | 03.04 | 15.28 | 01.34 | 13.58 | 02.49 | 15.13 |

5 707265 100043 >